# Deildarlei›ari til ALS

Starvi› sum deildarlei›ari á
Fíggjar- & fyrisitingardeildini er leyst at søkja

Høvu›suppgávan hjá deildarlei›aranum er, í gó›um samskifti vi› starvsfólki›, at lei›a og skipa dagliga arbei›i› á deildini.

Fíggjar- & fyrisitingardeildin, sum í løtuni hevur 8 starvsfólk, umsitur:

- dagliga roknskaparførslu og ger› av deildarroknskapum
- ger› av leypandi roknskapum og ársroknskapi
- ger› av rakstrar- og gjaldførisætlanum
- fíggjarligu ognirnar hjá ALS
- skrivarauppgávuna hjá lei›sluni
- ger› av kunningartilfari
- móttøkuna
- edv-kervi› á stovninum
- elektroniskt skjalasavn

Starvi› er sera fjølbroytt og avbjó›andi. Deildarlei›arin skal tí hava hóskandi útbúgving og gó›ar starvsroyndir.

Vi›komandi skal vera førur fyri og hava hug til, vi› samstarvi og virkisf‡sni, framhaldandi at menna øll øki, i› deildin umsitur.

ALS stendur stø›ugt fyri broyttum arbei›sfortreytum, og skal deildarlei›arin hava evni at tillaga seg broytingum í arbei›sumstø›unum.

Deildarlei›arin myndar, saman vi› deildarlei›aranum fyri Tryggingar- & ávísingardeildina og stjóranum, dagligu lei›sluna á ALS.

Løn sambært avtalu.

Starvi› ver›ur at seta sum skjótast. Skrivlig umsókn vi› avriti av prógvum og møguligum vi›mælum skal ver›a Arbei›sloysisskipanini í hendi í seinasta lagi 8. mai 2000.

Umsóknir skulu stílast til Elisabeth O. Gaardbo, stjóra á ALS, sum kann geva nærri frágrei›ing um starvi› á telefon 318396, lokal 137 ella 215535.

*ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stu›ul til arbei›sleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbei›sleysum at fáa arbei›i og at umsita arbei›sávísing fyri føroyska arbei›smarkna›in. Á ALS starvast í løtuni 23 fólk. Virksemi› hjá ALS er í høvu›sheitum lógarásett. Ovastu lei›sluna hevur st‡ri› fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbei›sgevara- og løntakarafeløgunum á arbei›smarkna›inum - ver›ur valt av Føroya Landsst‡ri.*

ALS
Arbei›sloysisskipanin
P.O.Box 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 319550 • Fax 310263
teldupostur: als@als.fo

# DEKK!

## Søla, skift og avbalansering

**Vit skifta eisini olju og filtur**

## HS Dekk

v/ Hugo Skorastein
Leirvík
Tlf. 222018

Frá Javnaðarflokkinum

## Innbjóðing til skeið

**Evni: Kommunuval 2000**

Javnaðarflokkurin skipar fyri skeiði fyri limum floksins

**í Suðuroy**
á Hotel Tvøroyri fríggjadagin
5. mai kl. 18.00

**í Havn**
á Hotel Hafnia leygardagin
6. mai kl. 10.00

**í Klaksvík**
í Gamla tekniska skúla mánakvøldið
8. mai kl. 19.00

Tilmelding í seinasta lagi **týsdagin 2. mai á tlf. nr. 284397.**

**Javnaðarflokkurin**

## Blákrossheimið søkir eftir starvsfólki

Søkt verður eftir fólki við hóskandi útbúgving til Blákrossheimið at byrja 1. august 2000.

**Hóskandi útbúgving:**
Sosialráðgevi
Lærari
Sjúkrasystir
Diakon
Pedagogur

Tað er eisini ein fyrimunur, hevur tú eina terapeutiska útbúgving og royndir innan rúsdrekkaviðgerð.

Starvið umfatar í høvuðsheitum viðgerð av rúsevnismisnýtarum. Harumframt eru nøkur praktisk ábyrgdarøki knýtt til starvið. Roknast kann við kvøld- og vikuskiftisvaktum.

Ein treyt er, at viðkomandi gongur inn fyri blákrosshugsjónini, sum bygd er á kristið grundstøði.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi sum skjótast, ella í seinasta lagi 1. juni 2000.

Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til leiðaran Sólborg Dulavík á tlf. 315575.

**Blákrossheimið**
Lynggøta 12, Tórshavn

## Kollafjarðar Havn

Í samband við sundalagsstevnuna, ið verður hildin í Kollafirði mánaðarskiftið juni-juli, verður gjørt vart við, at allir bátar, ið standa uppi á landi við bátahylin við Sjógv, skulu verða flotaðir ella fluttir burtur av økinum og plássið skal vera ruddað innan hálvan juni.

**Kollafjarðar Havn**

## Grundstykki Inni á Gøtu, Hoyvík, til sølu

Um hóskandi boð fæst, selja vit eitt byggibúgvið grundstykki á Ovarugøtu nr. 48, Hoyvík. Stødd 478 m².

Nærri fæst at vita við at venda sær til

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

## Arbeiðseftirlitið

Fútalág 1 B • P.O. Box 1134 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 317811 • Fax +298 314489
E-mail: info@arbeidseftirlit.fo
Heimasíða: http://www.arbeidseftirlit.fo

## Skeið á Arbeiðseftirlitinum

| | |
|---|---|
| 5. mai | Epoxyskeið |
| 9.-11. mai | Kranaskeið D |
| 12. mai | Íkrøkjaraskeið |
| 15.-17. mai | Trygdarskeið |

Tilmelding á tlf. 317811 ella við at senda teldupost til virgar@arbeidseftirlit.fo

**Arbeiðseftirlitið**



# SUMMAR-DEKK

## -vit skifta og avbalansera dekk

**Bilhúsið**
v/Jóhan Beder
530 Fuglafjørður
Tel. 444978

**ENM Bilverkstaður**
Í Gøtudali
Tel. 441888

**Bilverkstaðið**
v/Magnus Onghamar
á Kambsdali
Tel. 444943

**BBR Service**
620 Runavík
Tel. 449111

**Bilverkstaðið**
v/Símun Paula Berg
480 Skáli
Tel. 441209

**Shell Quick Service**
v/Dáva Joensen
700 Klaksvík
Tel. 456166

**Autoshine**
Stoksoyarvegur
700 Klaksvík
Tel. 457474

**Bilverkstaðið**
v/Brðr. Andreasen
460 Norðskáli
Tel. 422271

EURO Tyfoon
KUMHO DÄCK
ES



Sosialurin - 311820

# Stuðul

**Grunnurin til frama fyri samstarvi og fatan millum Nuuk, Reykjavík og Tórshavn**

Nú er møguleiki at søkja stuðul úr felags grunninum:

**Nuuk- Reykjavík -Tórshavn**

sum býráðini í Nuuk, Reykjavík og Tórshavn hava sett pening í, og hvørs endamál er at veita fíggjarligan styrk til tiltøk ella annað, ið kann fremja og menna samstarvið og fatanina millum kommunurnar og borgarar teirra.

Ætlanin er at viðgera innkomu umsóknirnar tann 31. mai 2000 á fundi í Reykjavík.

Býráðið heitir tí við hesum á einstaklingar, feløg o.o., ið halda seg koma undir fortreytirnar fyri stuðli, at senda býráðnum skrivliga umsókn við frágreiðing um tiltakið, nær tað verður framt og um mettan kostnað.

Fyri at verða viðgjørd nú í juni eigur umsókn merkt "Nuuk-Reykjavík-Tórshavn" at vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 26. mai 2000.

*Tórshavnar kommuna*

# Plantið eitt træ

**Aftur í ár letur kommunan 500 plantupakkar. Í hvørjum pakka eru 5 ymisk trø av niðanfyrinevndu sløgum, og er ein pakki til hvørt húski.**

**Plantusløgini eru:**

- Sitkaelri (Alaskael) Alnus sinuata, harðbalið skjóttvaksandi leyvtræ, verður miðal stórt.
- Dúnbjørk (Íslandsk bjørk) Betula pubescens, harðbalið og skjóttvaksandi leyvtræ, verður miðal stórt.
- Bivøsp, Populus tremula, skjóttvaksandi miðal stórt leyvtræ, villini upprunavøkstur fingin úr Hetlandi.
- Hyll, (Ylliniviður), Sambucus nigra, harðbalin leyvfallandi hávaksin runnur, best í léttari jørð og góðum sólargangi.
- Vanlig rønn, Sorbus aucuparia, harðbalið lágvaksið leyvfallandi træ úr Skotlandi, fær reyð ber um heystið.

Útflýggingarseðlarnir verða útflýggaðir í býráðssalinum,

**leygardagin tann 06. mai 2000**
**millum kl. 14.00 og 16.00**

Plantupakkarnir verða sum vanligt heintaðir hjá:

SKÓGRØKT LANDSINS,HVÍTANESVEGUR, HOYVÍK.

**mánadagin tann 08. mai 2000**
**millum kl. 9.00-18.00**

*Tórshavnar kommuna*

## 2 ISUSU lastbilar

(total vekt 6 t.), annar við 3,5 t. FR-krana, bíliga til sølu.

**Tel. 215921 og 315921**

# Skrivstovustarv

**Skrivstovustarv M/K**

Eitt av starvsfólkum okkara fer undir aðra útbúgving, og tí verður søkt eftir einum fólki til Teknisku Avgreiðslu.

Á Teknisku Avgreiðslu arbeiða í løtuni 5 fólk og saman við Teknistovuni myndar Teknisk Avgreiðsla eina deild upp á 14 starvsfólk. Arbeiðsstaðið er á Hálsi í Havn.

Tann ið settur verður, skal hava skrivstovuútbúgving og hava áhuga fyri føroyskari rættskriving og gjarna kunnleika til enskt.
Royndir innan arbeiði við teldu er ein fyrimunur.

Teknisk Avgreiðsla hevur nógv samskifti við samstarvsfelagar á Føroya Tele og við viðskiftafólk úr øllum Føroyum. Hetta samskiftið er sum oftast um telefonina ella um teldupostin.

**Arbeiðið umfatar viðgerð av umsóknum til:**
- Fastnet og fartelefonir
- Telefontænastur
- Útgerð (vekslarar, mynttelefonir, korttelefonir, terminalar o.a.)

**Uppgávur hjá Teknisku Avgreiðslu eru m.a.:**
- At skráseta og viðgera umsóknir av ymsum slag á EDV.
- At veita kundum og umsøkjarum vegleiðing.
- At skráseta tekniskar upplýsingar á EDV.
- At skráseta dáta til telefonbók á EDV.

Eitt sera spennandi arbeiði, við nógvum avbjóðingum.

Starvið er lønt sambart sáttmála við avvarandi yrkisfelag og Føroya Tele. Starvið ynskist sett sum skjótast.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Valborg Hjaltalin Jensen ella Kára Dal-Christiansen á telefon 30 30 30.

Umsóknir skulu verða inni í seinasta lagi 16.05.2000 og sendast til:

Føroya Tele
Stravsfólkadeildina
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*

SANSIR - TEL 355 355